Nr. 187 - 1. oktober 2002 Sosialurin 9

## Gøtuófriður í Havn

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjakvøldið var nakað av ófriði niðri í miðbýnum í Havn. Politiið var á staðnum fyrst um fýra tíðina og fekk skil á, men noyddust teir at venda oman aftur um hálvgum fimm tíðina. Tað vísti seg at vera tveir mans, ið ikki vistu, hvussu teir skuldu skikka sær, og byrjaðu at gera seg inn á politibilin. Teir báðir menninir vórðu tiknir inn á støðina, og verða skuldsettir fyri gøtuófrið eftir politiviðtøkuni og fáa tí eina bót.

Samanumtikið sigur politiið í Havn, at friðarligt hevur verið um vikuskiftið. Nøkur smá herverk hava verið á bilar, har antennur, viskarar og rútar eru brotnir. Harumframt var eisini herverk gjørt á onkran bil við Gomlu Rætt. Har var aftasti rúturin á einum bili brotin inn. Helst hevur verið talan um eina luftbyrsu ella líknandi, metir politiið.

## Bilur stolin í Klaksvík

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjadagin varð ein bilur stolin í Klaksvík. Hann var tó funnin aftur tveir tímar seinni, óskalaður.

Eisini var ein lastbilur farin útav Viðareiðisvegnum, men har stóðst eingin skaði av óhappinum.

Okkurt smávegis ferðsluóhapp hevur verið í Klaksvík um vikuskiftið, sum bara hevði materiellan skaða, og eisini var politiið boðsent til húsaófrið onkustaðni.

Annars verður latið væl at vikuskiftinum í Klaksvík. Friðarligt hevur verið, og politiið hevur ikki havt nógv at gjørt

## Ferðsluóhapp orsakað av rúsdrekka

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Tíðliga leygarmorgunin var eitt ferðsluóhapp millum Fjarða í Eysturoynni.

Ein bilur, sum var á veg suðureftir fór útav vegnum, og fór bóltandi niðan í bøin. Hann endaði á takinum. Tveir ungir mans, ávíkavist 21 og 22 ára gamlir, vóru við bilinum. Annar teirra bløddi illa í andlitinum.

Politiið í Runavík upplýsir, at talan hevur verið um rúsdrekkakoyring. Teir báðir ungu menninir vórðu koyrdir á læknamiðstøðina í Runavík, har teir vórðu seymaðir og blóðroynd var tikin av teimum.

Annars verður sagt frá hinum politistøðunum kring landið, at friðarligt hevur verið um vikuskiftið.

## 200 á ferð í Íslandi

**Punkbólkurin 200 hevur seinastu dagarnar spælt til fleiri konsertir í Íslandi**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Manningin í 200 hevur seinastu dagarnar verið á ferð í Íslandi, har teir hava havt fleiri framførslur.

Hóskvøldið spældi 200 í Hitt Húsið í Reykjavík. Har vóru íslendsku rockbólkarnir Solstafir, Forgarður Hevítis, I Adapt, Changer og Spildog eisini á pallinum.

Leygarkvøldið spældi 200 aftur, og tá vóru teir høvuðsnavn á konsert á Grand Kaffi í íslendska høvuðsstaðnum, har írski bólkurin The Dudley Corporation hitaði upp fyri 200.

# Brandur og Jóhanna Gúðrun í Fuglafirði

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Um vikuskiftið var stórfingin konsert við unga stjørnuskotinum Brandi Enni í Fuglafirði. Hann sang sjálvur, og eisini saman við íslendsku Jóhonnu Gúðrun, sum hann hevur sungið eina duett inn saman við.

Útselt var til konsertina og salurin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði var fullur bæði av heilt ungum og eldri fólki.

Konsertin byrjaði klokkan átta um kvøldið og í meira enn ein tíma undirhildu Brandur og hini øllum teimum, sum høvdu leitað sær í Mentanarhúsið leygarkvøldið.

Stór myndarøð og reportasja verður í blaðnum í morgin.



*Brandur Enni hevði leygarkvøldið konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Eisini var íslendska Jóhanna Gúðrun á pallinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Clickhaze sníkir seg upp á donskum hitlista

**Leygardagin var Clickhaze nummar 26 á Tjeklistanum hjá Danmarks Radio, sum verður mettur sum eitt tað heitasta staðið fyri tónleik í Danmark**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Hvørja viku tekur Danmarks Radio fepurin á best umtókta popptónleikinum í Danmark, og úrslitið verður gjørt upp á Tjeklistanum, sum verður sendur hvønn leygardag á P3.

Hesaferð hevur Clickhaze snýkt seg inn á listan við sanginum Daylight, sum hevur verið eitt ordans hitt í Føroyum. Sangurin hjá føroyska bólkinum er nummar 26 á Tjeklistanum, og aftanfyri seg hevur Clickhaze kend nøvn sum Bon Jovi, Atomic Kitten, Eminem og Alicia Keys.

P3 hevur spælt Daylight nógv seinastu vikurnar, og hetta er helst orsøkin til, at sangurin er komin við á Tjeklistan.

Lurtararnir hava eisini ávirkan á listan, og tað ber til at gera sína ávirkan galdandi á heimasíðuni hjá Tjeklistanum, sum er at finna á: www.dr.dk/p3/tjeklisten



*Clickhaze er komið inn á ein tann týdningarmesta danska hittlistan fyri popptónleik*

# Føroyingar og íslendingar krevja rætt til stórt øki



*Vit síggja stóra økið sunnan fyri sum føroyingar gera krav uppá. Eisini íslendingar, bretar og írar gera krav uppá stóra økið sunnan fyri Føroyar og vestan fyri bretsku oyggjarnar og Írland.*

**Sunnan fyri Føroyar liggja risastóru Rockall og Hattonháslættarnir, sum metast at goyma kolvetni og onnur ráevni. Fýra lond gera krav uppá hetta stóra økið, teirra millum Føroyar og Ísland. Nú markið millum londini er komið uppá pláss fer orka at verða brúkt til kanningar av økinum sunnanfyri**

MARK OG UNDIRGRUND
*Jan Müller*

- Vit fara nú at leggja alla orku í at loyst stóra marknamálið fyri sunnan, nevniliga rættin til Rockall og Hattonháslættan sigur íslendski uttanríkisráðharrin Halldór Ásgrímsson við Sosialin, eftir at hann og løgmaður hava undirskrivað eina avtalu um markið millum Føroyar og Ísland.

Nú markið millum Føroyar og Ísland er komið uppá pláss fara bæði londini at brúka bæði tíð og orku til at útvega sær neyðugu prógvini til at kunna gera krav uppá part av hesum stóra øki tvs. eitt øki, sum liggur uttanfyri 200 fjórðingar og sum fýra lond gera krav uppá. Umframt Ísland og Føroyar eisini Bretland og Írland.

Halldór Ásgrímsson sigur, at íslendska stjórnin hevur sett einar 70 mill. kr. av til kanningar næstu fimm árini, sum skulu útvega teimum upplýsingar eitt nú um jarðfrøðina tvs. ryggin, sum gongur úr Íslandi til Føroya og víðari suðureftir. –Vit mugu hava okkara egnu upplýsingar og nú vit hava loyst marknatrætuna við føroyingar kunnu vit brúka orkuna uppá tað málið.

Íslendski uttanríkisráðharrin fegnast um, at Danmark nú hevur ratifiserað altjóða havrættarsáttmálan, nakað, sum Ísland hevur gjørt fyri nógvum árum síðani. Hann viðgongur, at tað enn er long leið at ganga, áðrenn nøkur semja fæst um tað stóra økið sunnan fyri Føroyar. Tað er sett ein freist til 2013 at fáa hetta málið loyst so ella so.

Hildið verður, at stórir møguleikar eru fyri at finna kolvetni í undirgrundini har. Haraftrat kemur at týðandi ráevni liggja á sjálvum havbotninum. Tað er m.a. ognar- og nýtslurættin til hesi tilfeingi, sum tey fýra londini gera krav uppá. Eisini frá føroyskari síðu verður arbeitt við hesum máli og kemur tað væl við, at meira orka og tíð ikki skal brúkast til at fáa markið við Ísland uppá pláss. Eftir hesa avtaluni og avtaluna við bretar um landgrunnsmarkið ber til at leggja seg eftir hesum fyri føroyingar seinasta marknamálinum. Føroyingar eru eisini farnir at savna sær tilfar, sum skal kunna staðfesta okkara rætt til part av økinum sunnanfyri. Tað verður so eisini Árni Olafsson, sum kemur at standa fyri hesum arbeiði eins og hann hevur gjørt tað í sambandi við hini marknamálini viðvíkjandi markið til Bretlands og Íslands.

Umframt hetta økið ger íslendingar eisini krav uppá eitt øki í Irmingarhavinum og so móti Jan Mayen.



*Umboð fyri Oljumálaráðið hitta íslendska uttanríkisráðharran í Tinganesi*
*Mynd Jens K. Vang*

# BP setir fólk at taka sær av førleikamenning



*Tummas Pauli Mýri her saman við Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP í Føroyum*
*Mynd Jens K Vang*

OLJA
*Jan Müller*

1. oktober tekur Tummas Pauli Mýri við starvi hjá oljufelagnum BP. Hann skal taka sær av førleikamenningini tvs. at hann skal vera við til at umsita tær mongu milliónirnar, sum BP hevur játtað at lata til førleikamenning ol. BP játtaði at lata umleið 40 mill. kr. í seks ár til førleikamenning. Tummas Pauli Mýri fær heitið "Business Development Adviser". Hann hevur sjálvur fingið útbúgving frá lærdum háskúlum í Skotlandi innan búskap. Hann hevur gingið á Robert Gordon University í Aberdeen og á Strathchlite University í Glasgow. Hann hevur so eisini starvast hjá BP í Bretlandi í umleið 2 ár. Herfyri varð hann settur í starv hjá kolvetnisskattaumsitingini í Klaksvík. Hjarnar Djurhuus sigur við Sosialin, at tað liggur nógv meira arbeiði í førleikamenningini enn man kanska hevði mett um frá byrjan. Fyri at fáa hetta arbeiði gjørt til fulnar hevur felagið tí sett fólk burtur av at taka sær av hesum. Talan er so ikki bara um BP. Í loyvunum hjá BP er eisini Shell við umleið einum triðingi.

## Leggja oljuráðstevnu til rættis

OLJA
*Jan Müller*

Í farnu viku møttust umboð fyri Oljuvinnufelagið, Oljumálaráðið og FOIB at tosa um komandi oljuráðstevnuna. Seinastu árini hevur verið skipað fyri eini oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Hóast lítið virksemi er á føroyaøkinum fyri tíðina, so halda fyrireikararnir kortini, at hesin stevnutáttur eigur ikki at verða tikin av. Avgjørt er at skipa fyri einum temadegi fyrsta vikuskifti í desember. Tá verður gjørdur status millum oljufeløg og myndugleikar.